# Hvidovre kiksaði aftur

**Enn eina ferð vóru teir í Hvidovre undirmannaðir, tá teir taptu á heimavølli, og Randers Freja reisti seg eftir steypavónbrotið í síðstu viku**

1. DEILD DANMARK
*Jóannes Hansen*



Tað gongur ikki væl hjá Hvidovre. Tað tykist sum um teir bíða eftir, at kappingarárið skal vera liðugt. Tá fer liðið at spjaðast í allar ættir. Men teir skulu ansa sær. Fleiri av liðunum, sum eru undir Hvidovre á støðutalvuni, eru farin at gera eitt sindur um seg. Eitt dømi um hetta er B93, sum sunnudagin vann 2–0 á heimavølli ímóti Skive. Tað er okkurt, sum bendir á, at gamla stórfelagið á Eysturbrúgv fer at varðveita sessin í næstbestu deildini.

Og kappingarárið verður langt í næstbestu donsku deildini. Síðsta umfarið verður ikki fyrrenn 16. juni. Tað vil siga, at teir fara at spæla, meðan danir og øll onnur fara at fylgja við, hvussu tað fer at ganga hjá m. a. Danmark í HM kappingini. Tað verður ikki serliga hugaligt hjá Óla Johannesen og teimum.

Hesa ferð hevði Hvidovre vitjan av B1913 úr Odense. Gestirnir fóru við øllum. Tíðliga í 2. hálvleiki misti Hvidovre ein mann, tí tá sá Jakob Just reytt. Í 54. minutti skoraði B1913 tað, sum seinni vísti seg at verða sigursmálið. Hvidovre megnaði ikki við færri spælarum at venda gongdini. Komandi sunnudag skal Hvidovre spæla í Kolding.

Atli Gregersen er ikki millum teir ellivu bestu hjá Randers Freja. Men tað gongur væl hjá krúnjydunum, sum teir plaga at verða nevndir. Randers megnaði hóskvøldið 0–0 á heimavølli ímóti OB. Tá var talan um seinnu hálvfinaluna í steypakappingini. OB hevði vunnið tað fyrru 1-0. Tí verður tað OB, sum skal spæla ímóti FCK í finaluni í Parkini Kristi himmalsferðardag.

Randers Freja hevði stóran heiður av avrikinum ímóti superligufelagnum. Og teir vístu sunnudagin, at tað stendur væl til. Johan B. Hansen og Fredericia vitjaðu, og Randers Freja vann 1–0.

Í toppstríðnum er Farum væl fyri. Teir vunnu 5–1 á útivølli ímóti Brønshøj. Christian Andersen, Farum venjarin, segði eftir dystin, at hann ivast ikki í, at liðið hjá honum er nóg gott at blanda seg í ovaru helvtina av superliguni.

Oddaliðið Køge tapti 2–1 í Valby ímóti Frem. Ole Mørch og hansara menn í Frem vóna framvegis, at tað skal eydnast teimum at flyta upp.

HFK Sønderjylland tykist vera punkterað. Hesa ferð taptu teir 4–0 í Herfølge. Gamla felagið hjá Jákupi Mikkelsen er komið fyri seg. Teir flyta ikki upp í ár, men um teir varðveita fólkið, so kunnu teir fara at gera um seg komandi kappingarár.

# Molde sera sannførandi

**Jákup Mikkelsen var á beinkinum, tá liðið hjá honum vann tryggan sigur og harvið framvegis er ósigrað**

NOREG
*Jóannes Hansen*



Tað gongur væl hjá Molde. Sunnudagin var triðja umfarið í bestu norsku deildini á skránni. Molde hevði heimavøll ímóti Viking úr Stavanger. 5.200 áskoðarar møtttu upp, og lagið var gott. Heimaliðið vann 3-0. Venjarin Gunde Bengtsson segði seg vera sera fegnan um, at hansara lið vísti trygt, væl skipað og málsøkið spæl.

Mest eyðsýndi spælarin var í slendski álopsmaðurin Andri Sigthórsson. Hann skoraði fyrsta málið í yvirtíðini í 1. hálvleiki. Í 2. hálvleiki skoraði Molde í 54. og 78. minutti.

Jákup Mikkelsen var á beinkinum. Í málinum stóð Eddie Gustafsson, sum í VG fekk miðal skoðsmál fyri avrikið – eitt fimm tal. Vónin hjá Jákupi má vera, at kappingarneytin verður biðin at koma til HM við svenska landsliðnum. Tað verður í Suðurkorea og Japan um ein mánað. Molde hevur havt tríggjar málverjar, men nú er tann triði leigaður úr. Knud D. Lillebakk fór 23. apríl til Bryne. Har skal hann vera inntil 30. mai.

## Bodø fremst

Molde er næstfremst. Frammanfyri teir er Bodø/-Glimt, sum – á sama hátt sum Molde – hevur vunnið tvær ferðir og eina ferð spælt javnt. Teir eru eitt mál frammanfyri Molde. At liðið er Bodø er fremst er óhoyrt. Teir plaga at stríðast í botninum.

Hesa ferð høvdu teir í Norðurnoregi vitjan av Stabæk, sum varð sent til hús aftur við 2–0 tapi.

Aftast er Brann úr Bergen. Teir eiga framvegis á at vinna. Íslendski venjarin, Teitur Þórdarson, sigur seg ikki vilja geva skarvin yvir. Hann heldur, at teir arbeiða miðvist og álvarsliga, og at sigrarnir fara at koma. Hesa ferð var úrslitið 2–2 á útivølli ímóti Start. Hetta var triði javnleikurin í trimum dystum hjá Start.

## Rosenborg á talvuna

Favorittarnir úr Tróndheimi hava havt eina laka byrjan. Hesa ferð var kortini eingin ivi. Rosenborg hevði leygarkvøldið vitjan av Lyn, sum varð sent til hús við 5–1 tapi.

Saman við Molde hevur verið roknað við, at Lillestrøm skuldi kappast ímóti Rosenborg. Sunnudagin var avrikið hjá Lillestrøm ikki gott. Teir spældu vánaliga á útivølli ímóti Bryne, sum hevði uppiborið at fingið meiri enn 1–1 á heimavølli.

Á Ullevaal hevði Vålerenga vitjan av fyrrverandi føroyska liðnum Sogndal. Heimaliðið vann 2–0. Hetta var fyrsti sigurin hjá teimum í ár.

Í Moss vóru teir illa hýrdir. Teir trýstu støðugt á heimavølli ímóti Odd Greenland, men tað vóru gestirnir, sum fóru við øllum. Teir vunnu 1–0.

Tað verður spælt aftur í Tippuliguni í annaðkvøld. Stórdysturin verður ímillum Lillestrøm og Rosenborg. Molde skal spæla á útivølli ímóti Lyn.




...dsfloksins 2002




Sambandsflokkurin B
- gott samstarv